Tveir nýggir barnagarðar í Runavíkar Kommunu

Runavíkar Kommuna fær tveir nýggjar barnagarðar í næstum. Ein við Toftavatn og ein í Lamba

BARNAANSING
Edvard Joensen

Runavík: Runavíkar Kommuna ger nakað við barnaansingina. Langi bíðilistin skal styttast munandi, og tað skal gerast við tveimum barnagørðum, sum verða klárir komandi ár.

Við Toftavatn er farið undir at grava út fyri einum nýggjum barnagarði, sum ætlandi skal hýsa 90-100 børnum, meðan skúlin í Lamba við eini lítlari tilbygging skal gerast útibarnagarður, har eini 20-30 børn fara at ganga.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sigur, at nýggi barnagarðurin við Toftavatn væntandi verður liðugur seint í 2002. Hvør endaligi kostnaðurin fyri barnagarðin verður, vil Rodmundur Nielsen ikki siga nakað um enn.

–Tað er iki komið so langt enn, sigur hann, hóast útgrevsturin er í gongd. Enn er ikki alt arbeiðið boðið út.

Hinvegin veit hann at siga, at útibarnagarðurin í Lamba fer at kosta umleið 500.00 - 600.000 krónur.

Talan er um at byggja ein tilbygning upp í skúlan í Lamba, sum síðan skal brúkast til útibarnagarð, har eini 20-30 børn fara at halda til. Hesin barnagarðurin skal eftir ætlan vera klárur at taka í brúk tíðliga í komandi ári, sigur borgarstjórin.

Rodmundur Nielsen metir Lamba at vera eitt satt Paradís, sum neyvan fæst betri til júst hetta endamálið.

–Væl kann tað vera, at tað liggur eitt sindur avsíðis, um vit hugsa um fólk, sum búgva í Runavík. Men Í Runavíkar Kommunu er í grundini alt avsíðis, heldur borgarstjórin og sipar har við til, at kommuna røkkur heilt innan av Skipanesi til Æðuvíkar.

Hesir báðir barnagarðarnir, sum nú koma afturat í Runavíkar Kommunu, skuldu farið at hjálpt reiðiliga væl upp á tørvin, sum er. Í dag eru umleið 70 børn á bíðilista, meðan hesi bæði tilboðini fara at hýsa stórthundrað børnum.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, og Hans Jacob Lamhauge, formaður fyri sjálvsognarstovnin Kongshavnar Barnagarð, hyggja at útgrevstrinum fyri nýggjum barnagarði við Toftavatn
Mynd: Jens Kristian Vang

Samráðast um kommunalar sáttmálar

Starvsmannafelagið og kommunurnar samráðast um sáttmálar fyri kommunalu starvsfólkini. Miðað verður í móti eini semju í komandi viku

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
Edvard Joensen

Starvsmannafelagið og kommunalu myndugleikarnir samráðast í løtuni um sáttmála fyri kommunalu starvsfólkini, sum eru limir í Starvsmannafelagnum. Samráðingarnar hava staðið við, síðan avtalan við Fíggjarmálastýrið varð gjørd í mei mánaða, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, sigur, at nú hevur hendan samráðingarstøðan vart so mikið leingi, at tíð er at fáa hana endaliga avgreidda. Og hann hevur vónir um, at tað fer at bera til, skilst á honum.

–Sjálvandi er ilt at siga nakað fyri vist, áðrenn farið er undir seinastu fundirnar. Men vit høvdu ein fund í vikuni, sum gav vónir um, at okkurt fer at spyrjast burturúr, sigur hann.


Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, vónar, at ein sáttmáli um kommunalu starvsfólkini fæst í komandi viku

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at nýggjur samráðingarfundur er avtalaður at verða fyrrapartin komandi mánadag. Og tá roknar hann við, at eitt endaligt úrslit fæst.

–Hvussu annars verður, ber bara til at gita um. Øll vita, hvørjar møguleikar vit hava, um tað ikki endar við semju, sigur hann.

Har við sipar hann sjálvandi til, at tað í ringasta lagi kann enda við einum verkfalli á kommunalu arbeiðsplássunum. Men tí møguleikanum vilja báðir partar helst sleppa undan, skilst á formanninum í Starvsmannafelagnum.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at teir hava í grundini tveir partar at samráðast við. Tað eru tey bæði kommunalu arbeiðsgevarafeløgini, Kommunufelagið og Kommunusamskipanin. Tað eru nógvar kommunur í hesum báðum felagsskapunum, og tær eru rættiliga ymiskar. Bæði stórar og smáar. Tað kann so vera ein orsøk til, at tað gongur eitt sindur strilti við samráðingunum, heldur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, sum leiðir samráðingarnar hjá kommunalu starvsfólkunum.

Fornminnissavnið væl vitjað

Føroya Fornminnissavn hevði umleið 7.000 vitjanir í summar

FRAMSÝNINGAR

Føroya Fornminnissavn letur hampiliga væl at úrslitinum fyri summarið. Eini 7.000 fólk hava vitjað savnið í summar.

Sagt verður í tíðindaskrivi frá Føroya Fornminnissavni, at meðan savnið hevur havt opið í summartíðini, sum hjá teimum er frá 21. mei til 31. august. hava sløk 7.000 fólk verið á savninum. Av hesum eru 54 skúlaflokkar við 784 næmingum og 78 lærarum, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Nú vetrartíðin á Fornminnissavninum nærkast, verða væntandi færri vitjanir, skilst á tíðindaskrivinum. Kanska einamest tí, at ikki veður opið dagliga, sum tað er um summarið. Í vetur verður Fornminnissavnið bara opið fyri almenninginum sunnudagar millum klokkan 15 og 17.

Tó sleppa skúlaflokkar og aðrir bólkar, har minst 10 fólk eru við, inn á savnið hvønn dag í arbeiðstíðini, sum er millum klokkan 08 og 16. Sagt skal tó verða frá á savninum frammanundan.

Føroya Fornminnissavn hevur Føroya søgu at sýna fram frá landnámi til okkara tíð. Mest er tó, sum vera man frá tí, sum hendi... »úti í gomlum døgum«.

Fornfrøðiligir útgrevstar, rúnasteinar og -kelvi. Gamli Dímunarseyðurin. Hann sum....»svartur var sum kolamógvur og vártreystur út av lagi«. Og annars alt møguligt, sum fólk hava brúkt í Føroyum bæði til arbeiðis og prýðis.

Føroya Fornminnissavn er í tveimum so at siga. Tað er framsýningarhøllin í Brekkutúni í Hoyvík, og so er tað útisavnið niðri í Hoyvík. Heima á Garði, sum tey nevna tað.

Har er gamli býlingurin settur í stand, sum hann var umleið 1920. Við kríatúrum og øllum tíð, sum til hoyrir.

Føroya Fornminnissavn sigur í tíðindaskrivinum, at tey fegin vilja vísa fólki savnið, nær tað skal vera. Tað er bara at siga frá, um ætlanin er at koma uttan fyri almennu upplatingartíðirnar.

Eisini fæst ymiskt um savnið at vita á heimasíðuni hjá Fornminnissavninum, sum eitur: www.natmus.fo

ej

Øll mintust offrini

Føroya Landsstýrið lýsti fríggjadagin sum almennan sorgardag í sambandi við yvirgangsatsóknirnar í USA í vikuni. Bæði fólk og náttúra tagdu um middagsleitið í gjár

MINNINGARHALD

Tá kirkjuklokkurnar slóu tólv sløg á middegi í gjár, legðist tøgn um landið alt. Fólk steðgaðu á og mintust tey túsundtals óseku fólkini, sum svakligir yvirgangsmenn tóku lívið av týsdagin.

Tað oysregnaði fram móti middegi fríggjadagin, meðan fløggini hingu í hálvari stong, og ljós brunnu í ymsum vindeygum.

Hjá blaðhúsinum á Argjum er kirkjutornið næsti granni, og hugnaliga klokkuljóðið úr kirkjutorninum minnir okkum regluliga á, hvussu stutt løtan er, vit hava fingið tilmálda.

Á middegi minti ljóðið á, at nú varð hildin tøgn, teirra til minnis, sum fórust í álopunum týsdagin.

Friðurin kendist so ítøkiligur, tí sjálvt regnið uttan fyri tagdi. Náttúran helt eisini tøgn ta løtuna, Føroya Landsstýrið hevði biðið føroyingar halda tøgn í tveir minuttir hendan dagin.

Og beint eftir, at farið varð aftur til arbeiðis, fór aftur at regna, eins groft og tað gjørdi fyri middag.

Í Havnar Kirkju vóru eini 60 fólk komin saman at minnast offrini úr USA. Tá klokkan sló á middegi, reistist kirkjuliðið og stóð í tøgn í tveir minuttir. Bjarni Bæk, dómpróstur, lýsti frið yvir minni teirra, sum fórust í atsóknunum, áðrenn minningarløtan endaði við, at prósturin las Faðirvár.

ej

Bjarni Bæk, dómpróstur, lýsti frið yvir minni teirra, ið fórust í atsóknunum í USA
Mynd: Jonhard Hammer

Lønargjaldingar seta met

Fiskiskapur er tann vinnugreinin, ið liggur fremst, tá talan er um lønargjaldingar

Í fjør vórðu goldnar 4,87 milliardir krónur í lønum. So høgt hevur talið neyvan verið seinastu tíggju árini

LØNIR
Stefan í Skorini

Seinastu fimm árini eru lønargjaldingarnar støðugt øktar. Hetta stendur at lesa í seinastu Hagtíðindum frá Hagstovu Føroya.

Í fjør vórðu 4,87 milliardir goldnar í lønum, og hetta er munandi meira enn árini frammanundan. Í 1995 vóru lønargjaldingarnar 3,22 milliardir krónur, og síðani eru lønirnar øktar ár um ár.

Higartil í ár eru lønargjaldingarnar 3,5 milliardir. Hetta eru góðar 400 milliónir meira enn sama tíðarskeið í fjør. Tí er líkt til, at lønargjaldingarnar við ársenda verða størri enn fyri árið í fjør.

Fiskiskapurin fremst

Størsti parturin av lønargjaldingunum er innan fiskiskap. Har hava arbeiðsgevararnir latið 834 milliónir í lønum í fjør.

Næst á listanum er almenn fyrisiting. Á hesum økinum eru goldnar 727 milliónir krónur í lønum. Á heilsu- og almannaverkinum hevur landið latið 558 milliónir krónur í lønum.

Higartil í ár er talan um vøkstur í lønargjaldingunum innan allar vinnugreinar í mun til í fjør.

Hagstovan hevur býtt vinnugreinarnar í tríggjar høvuðsbólkar: Framleiðsluvinnur, bygging o.a. tænastur og seinastu høvuðsbólkurin er almennar tænastur.

Býtið í lønargjaldingum millum hesar høvuðsbólkar er javnt. Góð 1,6 milliard er goldið í lønum innan hvønn høvuðsbólk.

Løgreglan kannar málið gjølla

Løgreglan hevur enn ikki tikið nakran persón í sambandi við knívsálopið á ein 15 ára gamlan drong týskvøldið. Alt bendir tó á, at løgreglan hevur greiða ábending um, hvør framdi álopið

Jón Klein Olsen, støðleiðari, sigur, at løgreglan hevur rímiliga góðar ábendingar um, hvørjum hon skal fara eftir

HARÐSKAPUR
Stefan í Skorini

Tað er eingin ivi um, at hetta málið verður mett sum grovur harðskapur. Tað sigur Jón Klein Olsen um tilburðin, tá átta dreingir framdu álop á ein 15 ára gamlan drong í Havn týskvøldið.

Hetta hóast drongurin ikki hevur fingið varandi mein av álopinum. Løgreglan sigur, at um knívur ella annað amboð verður nýtt í álopi, so er tað grovur harðskapur, uttan mun til hvussu stórur skaðin er.

Jón Klein Olsen sigur, at enn hava tey ikki avhoyrt ella tikið nakran, sum er undir illgruna. Orsøkin til tað er, at løgreglan vil undirbyggja tær ábendingar, sum hon longu hevur. Málið skal við øðrum orðum kannast gjølligari, áðrenn farið verður víðari.

Og støðleiðarin sigur, at løgreglan hevur rímiliga góðar ábendingar um, hvørjum hon skal fara eftir. Tí er væntandi, at onkur verður tikin til avhoyringar í næstum.

Annars sigur Jón Klein Olsen, at tað væl er hugsandi, at Føroya Tele kann spora hóttandi SMS-boðið, sum drongurin fekk um internetið á fartelefonina fyrr um dagin.

Nýggj skúlabók til tey smæstu

BÓKAÚTGÁVA
Stefan í Skorini

Mikudagin gevur Føroya Skúlabókagrunnur út nýggja lesibók til 1. flokk. Hon nevnist »Hervør og Høgni í skúla«.

Henda nýggja bókin er ein stórhending í føroyska skúlaverkinum. Tað er nevniliga ikki á hvørjum degi, at vit fáa eina lesibók á móðurmálinum.

Tað er Hjørdis Heindriksdóttir, ið hevur skrivað bókina. Hon er fólkaskúlalærari. Listamaðurin Olivur við Neyst, sum hevur myndprýtt.

Høvuðsinnihaldið er føroyska umhvørvið og gerandisdagurin, og tí fara børnini at kenna seg aftur í tí, tey lesa. Útgevararnir siga, at stórt arbeiði er lagt í, at bókin kann nýtast til mongu og ymisku háttaløgini í undirvísingini.

Saman við lesibókini eru lærarabók, arbeiðsbók, bókstavakort í A-4 støddi. Lærarin hevur tískil fingið heildartilfar, sum kann nøkta øll krøv, ið verða sett undirvísingini.